# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

**Virksemi**

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Endamálið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrsins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymiskar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

**Árið 2015**

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla íverksetan, ráðgeving, menning og sølu í 2015.

Eins og undanfarin ár, er raksturin støðugt tillagaður soleiðis, at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti metir stýrið, at stuðulin verður betur gagnnýttur til mennandi verkætlanir. Skipanin, har samskiparin er bindilið millum stýrið og umsøkjaran, ger at umsóknin verður skjótari viðgjørd og umsøkjarin fær røttu ráðgevingina viðvíkjandi møguleikum við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur í 2015 umsitið skipasmiðjustuðul, Horizon 2020 SME, sum er ES stuðul til smáar og miðalstórar fyritøkur, umframt heimasíðuna www.invest.fo har m.a. spurningar verða svaraðir um fíggjarlig og skattlig viðurskifti í Føroyum.

Í 2015 hevur Vinnuframi lagt dent á at gerast meira sjónligur sum grunnur, so fleiri fáa kunnleika til teir møguleikar sum grunnurin hevur at bjóða íverksetarum. 12. til 14. mai luttók Vinnuframi á sølustevnuni Atlantic Fair í Klaksvík á einum bási saman við Granskingarráðnum og Fiskivinnuroyndum. Í tí sambandi hevði Vinnuframi eina framløgu um grunnin og stuðulsmøguleikar. Í august luttók Vinnuframi á Nebula, sum var á Reinsarínum í Havn. Í døgunum 22. til 23. oktober luttók Vinnuframi á Faroexpo í Runavík, har hevði Vinnuframi ein bás saman við umsøkjarum hjá Vinnuframa. Í november 2015 skipaði Vinnuframi fyri einum tiltaki í høllini hjá Vinnuframa sum skuldi varpa ljós á íløgu- og fíggingarmøguleikar, tá luttóku TF Íløgur, Royndin, Framtak og BankNordik. Saman við Granskingarráðnum, NORA og Fiskivinnuroyndum hevði Vinnuframi ein kunnandi fund um stuðulsmøguleikar í november í høllini hjá Vinnuframa. Javnan verður heitt á Vinnuframa um at greiða frá sínum virksemi í sambandi við smærri og størri tiltøk. Tað hevur gingist væl at gera íverksetarar og fyritøkur varug við, hvat Vinnuframi er og hvat grunnurin kann bjóða. Eisini vísir ein kanning, sum Vinnuframi gjørdi í 2015, at umsøkjarar halda, tað er grundað á stuðulin

frá Vinnuframa, at teirra verkætlanin er vorðin veruleiki. Av teimum spurdu søgdu fleiri, at tað er lætt at koma í samband við Vinnuframa og svartíðin er stutt, tí stýrið kemur saman eina ferð um mánaðin. Umsøkjarin kann, um hann ynskir, leggja sína verkætlan fram á stýrisfundinum, tá umsóknin er til viðgerðar. Fleiri umsøkjarar taka av møguleikanum at møta stýrinum og greiða frá verkætlanini, tískil er talan um eina stuðulsskipan, har tað er stutt millum umsøkjara og tey ið skulu taka avgerðina.

Samstarvið við Íverksetarahúsið í Klaksvík og Hugskotið í Havn er styrkt munandi í 2015. Vinnuframi avgjørdi at gera Creative Business Cup til eitt samstarv og bjóðaði í tí sambandi báðum íverksetarhúsunum at vera við at skipa fyri føroysku kappingini, sum varð hildin í høllini hjá Vinnuframa tann 18. september. 10 verkætlanir luttóku og dómsnevndin avgjørdi at senda fyritøkuna Beak, við verkætlanini ClearComm, til altjóða kappingina í Keypmannahavn í november. Í dómsnevndini sótu Regin W. Dalsgaard, Vinnuframi, Joel undir Leitinum, Posta, Marita Rasmussen, Vinnuhúsið, Regin Hammer, Tryggingarfelag Føroyar og Jóhanna á Bergi, Atlantic Airways. Fleiri onnur samstørv eru millum Vinnuframa, Íverksetarahúsið og Hugskotið. Arbeitt verður framvegis miðvíst við at styrkja sambandið millum stovnarnar, so íverksetarin fær bjóðað eina røð av møguleikum at menna sítt hugskot og sína verkætlan.

Í 2015 hevur tað verið arbeitt ítøkiligt við at lýsa stuðulsmøguleikarnar í ES skipanini Horizon 2020 SME, sum er fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Samskiparin hevur í hesum sambandi verið nakrar ferðir í Brússel í samráð við Granskingarráðið, sum umsitur Horizon 2020 skipanina. Fyritøkan Frami er fyrsta og einasta fyritøka, sum higartil hevur fingið stuðul úr skipanini SME Instrument og fekk Frami í oktober 50.000 EUR til stig 1. Vinnuframi hevur áður latið Frama stuðul í sambandi við patent umsóknina, sum er ein partur av somu verkætlan. Vinnuframi hevur fingið samband við ein danskan serfrøðing, sum hevur havt ein stóran leiklut tá skipanin SME Instrument bleiv gjørd, tí avgjørdi Vinnuframi á heysti 2015 at bjóða honum til Føroyar at hava eitt skeið í janaur 2016, so føroyskar fyritøkur kundu fáa kunnleika til møguleikarnar í H2020 fyri smáar og miðalstórar fyritøkur.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa í 2015 vóru 319 tkr. í mun til 327 tkr. í 2014.

Vinnuframi hevur viðgjørt 79 umsóknir í 2015, sum er met, í mun til 68 umsóknir í 2014, sum eisini var met. Søkt varð um 11.424 tkr. í 2015 í mun til 8.346 tkr. í 2014. Í stuðli vórðu í 2015 veittar 3.365 tkr., meðan 1.184 tkr. vórðu afturførdar.

Við árslok 2015 var tøki peningurin 27.672 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul var 3.435 tkr.

**Framtíðin**

Tað eydnaðist í fleiri førum at gera Vinnuframa meira sjónligan í 2015, bæði online og við tiltøkum. Í 2016 verður arbeitt støðugt víðari við, at Vinnuframi skal gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur, tí aðalmálið hjá Vinnuframa er, at stuðulin kemur út til tær verkætlanir, har hann ger størst gagn føroyska vinnulívinum at frama.

Vinnuframi hevur játtað, at taka á seg fleiri uppgávur fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið. Hesar uppgávur verða ein partur av umsitingini í seinnu helvt av 2016 og byrjanini av 2017.

Íverksetan í Føroyum skal vera meira samanhangandi og streymlinjað, tí vil Vinnuframi, saman við Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og øðrum sum varða av íverksetarum, arbeiða fyri, at íverksetarin fær betri møguleikar og umstøður at fremja sítt hugskot.

Góða samstarvið við íverksetarahúsini í 2015 heldur áfram, tí verður í 2016 talan um fleiri felags átøk og tiltøk, sum varpað ljós á íverksetan í Føroyum. Creative Business Cup verður millum annað aftur í 2016. Føroyska finalan verður í august og fær føroyski vinnarin møguleika at luttaka í altjóða kappingini í Keypmannahavn, sum verður tann 20. og 21. november. Í altjóða kappingini luttaka fleiri enn 50 lond.

Vinnuframi fer í seinnu helvt av 2016 at skipa fyri skeiðum til íverksetarar. Endamálið er at geva íverksetarunum betri førleikar og ítøkilig amboð at arbeiða við, sum tryggjar, at verkætlanin ella hugskotið kann fremjast.

Vinnuframi fekk í 2015 met tal av umsóknum tá inn komu 79, av hesum blivu játtaðar 49 umsóknir. Søkt varð fyri meira enn 11 mió. kr. Játtanin hjá Vinnuframa er á 3,2 mió. kr. og hon fylgir tí ikki við gongdini, tískil er talan um fleiri og góðar verkætlanir, sum stýrið ikki kann ganga á møti grundað á vantandi fíggjarorku. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri fleiri íverksetarar.

Ein onnur avbjóðing hjá føroyskum íverksetararum er, at í Føroyum eru fá sum bjóða seg at fíggja ella gera íløgur í váðafúsar verkætlanir. Vinnuframi hevur í fleiri førum sæð góðar verkætlanir sum steðga upp grundað á, at ongin váðafúsur kapitalur er at finna í Føroyum. "The valley of death" er eitt kent fyribrigdi innan íverksetan, tó tykist trupulleikin at vera størri í Føroyum, tí onki felag hevur sokallaðan venture kapital. Vinnuframi hevur í fleiri førum gjørt vart við hetta og fer tí støðugt at varpa ljós á trupulleikan í 2016. Í samráð við tey sum varða av íløgum- og fíggingarmøguleikum, vil Vinnuframi finna eitt felags stev fyri váðafúsar verkætlanir, so fleiri føroyskar verkætlanir kunnu gerast veruleiki.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Niðanfyri sæst ein lýsing av fýra av teimum 49 játtaðu verkætlanunum sum fingu stuðul játtaðan í 2015. Tað eru fleiri aðrar áhugaverdar verkætlanir játtaðar, men tær eru m.a. vardar av upphavsrætti og verða tískil ikki lagdar fram fyri almenninginum fyrr enn patent v.m. er avgreitt, ella tá vøran er komin á marknaðin.

### VERKÆTLAN 1

Umsøkjari: Beak

Verkætlanin í stuttum: Mennan av appini ClearComm Home

Lýsing: Beak er ein fyritøka á Toftum, sum millum annað ger appir, heimasíður og talgildar skipanir. Tað eru tríggir eigarar í Beak, Pól Andrias Larsen, Levi á Torkilsheyggi og Virgar Poulsen. Pól Andrias og Levi starvast dagliga í fyritøkuni.

Beak leggur dent á, at sniðgeving og menning verður gjørd í Føroyum. Beak hevur usability og user experience kunnleika, ið verður nýtt tá appir, skipanir og heimasíður verða framleiddar.

Beak hevur ment skipanina ClearComm, sum betrar um samskiftið og tilrættaleggingina av degnum hjá fólki, ið hava autismu. ClearComm er roynt á einum sambýli fyri fólk við autismu í Klaksvík. Skipanin ger tað lættari hjá starvsfólkunum at leggja dagin til rættis, eisini yvir eitt longri tíðarskeið. Ístaðin fyri myndatekin, sum verða klipt, límað og hongd á veggin, er ein røð av myndum í skipanini hjá ClearComm, soleiðis at tað er skjótt, bæði hjá tí sum hevur autismu og hjá starvsfólkinum, at samskifta. ClearComm Home er ein app, sum hevur somu eginleikar sum skipanin ClearComm, sum er ætlað til heimið og smærri eindir. Hon er ætlað hjálparfólki og avvarandi hjá teimum, sum hava autismu og er tí eitt hent og bíligt hjálpitól.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði 23. september 2015 at stuðla Beak við menningini av appini ClearCome Home.

Endamál: Endamálið við ClearComm Home er at betra um samskifti hjá teimum ið hava autismu. Við appini fáa fleiri kunnleika til ClearComm og tí verður talan um ein størri málbólk. Appin er á fleiri málum, tí kann hon seljast altjóða.

Úrslit: Beak hevur ment appina ClearComm Home sum verður at fáa í Appstore innan stutta tíð.

Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum: Beak søkti um stuðul úr stuðulsskipanini 03 Menning, ið er stuðul til menning av vørum ella tænastum sum eru munandi øðrvísi frá verandi vørum ella tænastum, ella hava ein serstakan kappingarfyrimun í mun til aðrar loysnir á marknaðinum.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

---

**VERKÆTLAN 2**

Umsøkjari: Navia

Verkætlanin í stuttum: Føroysk ullabjálving

Lýsing: Sp/f Navia bleiv stovnað í 2004. Fyritøkan byrjaði sum ein skúlaverkætlan, men hevur bygt seg upp til at vera førandi í Føroyum innan framleiðslu og sølu av føroyskum tógvi. Navia framleiðir eisini liðugt gjørdar vørur sum verða seldar um allar Føroyar. Sjey fólk starvast hjá Navia sum hevur handil og høvuðsskrivstovu á Toftum, umframt ein handil í SMS.

Grundarsteinurin undir øllum virkseminum hjá Navia er ullin, tí fór Navia undir eina nýggja verkætlan sum skuldi tryggja, at tann ullin, sum ikki kundi brúkast til tógv, ístaðin varð brúkt til annað endamál. Ull egnar seg til bjálving av húsum, men áðrenn ullin kann brúkast til hetta endamál skal hon vaskast og viðgerast, so hon gerst haldfør og ikki brandbar. Eftir hetta verður hon karða og pakkað til bjálving.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði 11. juni 2015 at stuðla Navia við menningini av verkætlanini "Føroysk ullabjálving".

Endamál: Í dag verður ein stórur partur av føroysku ullini brend. Ein orsøk er, at spinnaríini fáa ikki tikið ímóti øllum og hin orsøkin er, at nakað av ullini kann ikki gerast til gott tógv, men ullin egnar seg tó væl til bjálving. Við hesi verkætlan vildi Navia kanna hvussu væl føroyska ullin egnar seg til bjálving, hvussu hon er at arbeiða við og um tað fíggjarliga loysir seg at fara undir at framleiða ullabjálving.

Úrslit: Navia fekk 23 plattar av ullabjálving í oktober 2015. Bjálvingin varð viðgjørd soleiðis, at hon gjørdist mótstøðufør, bæði viðvíkjandi smákyknum og eldi upp til 530 hitastig. Síðani vórðu máttur framleiddar í støddini 120 cm x 57 cm. Higartil er ullabjálvingin roynd í fýra húsum í Føroyum. Bæði Navia og brúkararnir lata væl at úrslitinum. Ullabjálvingin verður royndarkoyrd til juni 2016.

Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum: Navia søkti um stuðul úr stuðulsskipanini 03 Menning, ið er stuðul til menning av vørum ella tænastum sum eru munandi øðrvísi frá verandi vørum ella tænastum, ella hava ein serstakan kappingarfyrimun í mun til aðrar loysnir á marknaðinum.

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## VERKÆTLAN 3

Umsøkjari: TARI - Faroe Seaweed v/Agnes Mols Mortensen

Verkætlanin í stuttum: Menning av taravørunum Ocean Truffle og Ocean Sweet

Lýsing: Agnes Mols Mortensen er lívfrøðingur við PhD grad innan tara, hon eigur og rekur fyritøkuna TARI -Faroe Seaweed saman við Mortani Mols Mortensen. Fyritøkan arbeiðir millum annað við at virka úrdráttir úr ymiskum tarasløgum. Taravørurnar Ocean Truffle og Ocean Sweet eru ætlaðar gourmet matstovum og gourmet vinnuni, men tær eru eisini áhugaverdar fyri nútímans húsarhaldið sum dámar at royna seg í køkinum.

Ocean Truffle er virkað úr reyðtaraslagnum *Vertebrata lanosa*, sum á føroyskum verður kallað *loðin skeggtari*. Í náttúruni veksur hann á einum øðrum taraslagi. Framleiðslan av Ocean Truffle er lívfrøðiliga burðardygg, tí tarin verður heintaður við hond á fjøru og tarin, sum loðni skeggtarin veksur á, verður standandi eftir og loðni skeggtarin veksur so aftur. Ocean Truffle er vælumtókt innan gourmet vinnuna, tí smakkurin minnir um trøflu. Ocean Truffle verður turkað og pakkað á Faroe Marine Products og er talan um eina eksklusiva vøru, tí prísurin fyri kilo er á leið 10.000 til 15.000 kr.

Ocean Sweet er virkað úr brúntaraslagnum *Saccharina latissima*, á føroyskum *breiðbløðkutur sukurtari*. Ocean Sweet verður framleitt úr aldari rávøru. Fyrsti partur fer fram á klekingarstøðini hjá TARI - Faroe Seaweed og seinni partur á línum í sjónum. *Saccharina latissma* er partur av natúrligu tarafloruni í Føroyum, men fyri at tryggja, at framleiðslan skal vera lívfrøðiliga burðardygg, og góðskan fyrstafloks, er neyðugt at ala. Eins og Ocean Truffle er Ocean Sweet sera lítið viðgjørt, har uppruna eginleikar og smakkur eru varðveitt. Ocean Sweet verður eisini turkað og pakkað á Faroe Marine Products og prísurin fyri kilo er á leið 2000 kr.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði 26. mars 2015 at stuðla TARI - Faroe Seaweed v/ Agnes Mols Mortensen við menningini av Ocean Truffle og Ocean Sweet.

Endamál: Tá talan er um matvørur er alneyðugt at gera kanningar av vøruni sum tryggja, at góðskan er í lagi. Endamálið við hesi verkætlan hevur verið at gera kanningar av innihaldsevnum í taranum.

Úrslit: Ocean Truffle og Ocean Sweet eru kannað, saman við fýra øðrum tarasløgum, ið TARI – Faroe Seaweed eisini arbeiðir við. Úrslitini eru serstakliga áhugaverd. Kanningarnar hava givið innlit í føðsluvirði, evnafrøðiliga samansetan og smáverðulífrøðiligan aktivitet hjá teimum ymisku tarasløgunum og úrslitini hava verið avgerðandi fyri at TARI – Faroe Seaweed trygt kann selja taraúrdráttir til matna.

Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum: TARI - Faroe Seaweed v/Agnes Mols Mortensen søkti um stuðul úr stuðulsskipanini 03 Menning, ið er stuðul til menning av vørum ella tænastum sum eru munandi øðrvísi frá verandi vørum ella tænastum, ella hava ein serstakan kappingarfyrimun í mun til aðrar loysnir á marknaðinum.

**VERKÆTLAN 4**

Umsøkjari: Harkaly Games Í/F

Verkætlanin í stuttum: Menning av telduspælinum Wormsteak

Lýsing: Telduspælið Wormsteak gjørdist vinnari av kappingini FT Game Jam 2015, úrslitið gjørdist ein demo. Spælið varð gjørt undir einum tíðartrýsti, tí einans 48 tímar vóru til at gera spælið. Fólkini handan Wormsteak tóku avgerð um at arbeiða víðari við spælinum og stovnaðu Harkaly Games Í/F.

Spælið skuldi gerast av nýggjum, so møguleiki var fyri at menna spælið. Eisini var neyðugt at gera level editor, fáa brúkarar at royna spælið og afturmeldingar áðrenn spælið kundi gevast út. Spælið skuldi gevast út ókeypis í Android og iOS, inntøkan skuldi koma frá lýsingum.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði 4. september 2015 at stuðla Harkaly Games Í/F við menningini av spælinum Wormsteak.

Endamál: Eftir kappingina FT Game Jam 2015 varð úrslitið ein demo av Wormsteak, tó var neyðugt at gera alla kotuna av nýggjum, umframt ljóð og grafik. Eisini skuldi arbeiðast við at fáa rørslur og gameplay at rigga til fulnar.

Úrslit: Harkaly Games Í/F gav spælið Wormsteak út tann 1. desember 2015. Spælið er ókeypis og fæst til Android og iOS. Wormsteak er vorðin ein veruleiki einans við føroyskari arbeiðsmegi. Inntøkan fyri spælið stavar í dag frá inntøkum av lýsingum. Marknaðarføringin av Wormsteak er næsta stig á leiðini hjá fyritøkuni Harkaly Games Í/F.

Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum: Harkaly Games Í/F søkti um stuðul úr stuðulsskipanini 03 Menning, ið er stuðul til menning av vørum ella tænastum sum eru munandi øðrvísi frá verandi vørum ella tænastum, ella hava ein serstakan kappingarfyrimun í mun til aðrar loysnir á marknaðinum.

## Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu fimm árini (í túsund krónum):




| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 258 | 25 | 198 | 239 | 0 | 720 |
| Ráðgeving | 258 | 0 | 150 | 609 | 605 | 1.622 |
| Menning | 1.319 | 939 | 568 | 1.810 | 1.810 | 6.446 |
| Søla | 1.109 | 1.522 | 1.492 | 1.302 | 950 | 6.375 |
| | **2.944** | **2.486** | **2.408** | **3.960** | **3.365** | **15.163** |

Samlað fyri árini 2011-2015 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

